

Noreg er á fyrsta plássinum á listanum, sum ger upp hvørji lond eru best at eiga børn í. Men ikki øll hava góð kor, og heilar 8,8 milliónir av børnum kring heimin doyggja, áðrenn tey gerast fimm ára gomul

MYND: ISTOCK

# Noreg er besta landið at eiga børn í

TAÐ VÍSIR ÁRLIGA KANNINGIN **»STATE OF THE WORLD'S MOTHERS' RAPPORT«**, SUM **RED BARNET** STENDUR FYRI. EFTIR **NOREG** KOMA AUSTRALIA, ÍSLAND, SVØRÍKI OG DANMARK. HESI **LOND** UMBOÐA **TOPP** FIMM, MEÐAN **AFGANISTAN**, NIGER OG TCHAD ERU **NIÐAST** Á LISTANUM



KANNING

Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

Kanningin umfatar heilsu og trivnað fyri kvinnur og børn, og hædd verður tikin fyri sjúkrarøkt, útbúgving og fíggjarligum møguleikum.

Eitt av stóru yvirraskilsunum er, at USA liggur heilt niðri á einum 28. plássi. Tað kemst av, at deyðstíttleikin fyri barnakonur er sera høgur fyri eitt framkomið land. Vandin fyri, at kvinnur doyggja í sambandi við barnsburð er fimm ferðir størri í USA enn í til dømis Bosnia, Grikkalandi ella Italia og tíggju ferðir størri enn í til dømis Írlandi, stendur í rapportini.

### Áttinda hvør barnakona doyr

Í Afghanistan doyr fjórða hvørt barn, áðrenn tað verður 5 ára gamalt, og ein út av átta kvinnum doyr í sambandi við barnsburð og føðing. Í Danmark er hetta talið umleið ein út av 18.000. Størsti trupulleikin í tilafturskomnu londunum er serliga, at atgongdin til lækna og heilsustovur er sera avmarkað.

– Tíbetur kunnu vit siga, at hóast talið er óhugnaliga høgt, so er hetta ein trupulleiki, ið er lutfalsliga lættur at loysa. Vit skulu útbúgva fleiri kvinnur, sum kunnu geva vaksinur, antibiotika og greiða aðrar heilsuligar trupulleikar fyri barnakonur, nýggjar mammur og børnini, sigur Sita Michael Bormann í Red Barnet við BBC.

Hvørt ár doygga 8,8 milliónir av børnum, áðrenn tey fylla fimm ár, og hetta talið er alt, alt ov høgt, stendur í rapportini.

Tí verður heitt á heimsins leiðarar um at seta meiri av peningi til síðis fyri at minka um barnadeyðan og til at útbúgva kvinnuligar heilsuhjálparar í u-londunum.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **EYÐBJØRN KARBECH MOURITSEN**
7 TIPS: **SUMMARBØKUR**
8 90 SEKUND: **PÁL JOENSEN**
10 BAKGRUND: **FERÐAMANNASKIPINI, IÐ KOMA Á HAVNINA**
12 SAMRØÐA: **HANUS, 60 ÁR**
16 UMRØÐA: **NÝGGJA FLØGAN HJÁ HANUSI**
18 VOXPOP: **HETTA MERKIR HANUS FYRI OKKUM**
20 BAKGRUND: **PRINSESSUBRÚDLEYP Í SVØRÍKI**
22 TIL ARBEIÐIS: **NANSY POULSEN**
23 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
24 FÓTBÓLTUR: **HM - OG FRÍÐUR Í EIN MÁNAÐ HJÁ KVINNUM**
26 HEILSA: **BØRN, MATUR OG ÍTRÓTTUR**
27 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **ARABISK BØNUSALAT**
31 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
32 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

KLUMMAN



*Inna Törnroos*

## Republikanari við undantøkum

Eg eri republikanari!

Eg eri republikanari!

Eg eri republikanari... uttan tá tað eru kongalig brúdleyp. Eg eri ein »sucker«, tá tað kemur til kongalig ball, stórar kjólar og glitur og glamour.

Eg forsvari tað við, at tað er einastu ferð, at man fær nakað fyri allar tær skattakrónur, man dag og dagliga rindar til tey kongaligu.

Leygardagin hevði eg vilja verið í Stockholm. Ikki tí – eg hevði ikki farið og hugt eftir korteguni, tað eri ov nógv republikanari fyri. Men stemningurin er serligur tá stór, kongalig ball eru í býnum.

Minnist tá eg nýinflutt til Stockholm var og veittraði til kongin á 50-ára degnum. Blívi flóv við tankan, at eg faktist stóð har og vinkaði til eina balkong millum hundratals aðrar kongaligar fjepparar.

Kongar, drotningar, prinsar og prinsessur hoyra heima í ævintýrheiminum, ikki í nýmótans samfeløgum.

At verða føddur til ríkidóm og ein tittul er so gamaldags, at man vil skrála.

Eitt er tó troystaríkt, og tað er, at nú hava vit øll møguleikan at gerast prinsar og prinsessur. Mary var onki annað enn ein vanlig kontórsdama, Daniel venjari, og daman hjá svenska prinsinum Carl Philip er fyrrverandi bikinimodell.

Summi taka synd í teimum kongaligu, tey sleppa ongantíð at verða í frið osfr. Eg hevði gjarna skift um við tey, kanska ikki krúnarvingarnar, men hini nummar tvey og trý í barnarøðini eru fødd til eitt perlulív. Ongar serligar pliktir, uttan bara pengar, slott og fyrimunir.

So Madeleine, Joakim og Harry – eg skifti lív við tykkum anytime!

Les mína grein á s 20-21 um søguliga brúdleypið, og hvat føroyingarnir í Svøríki halda um sirkusi.




VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Hanus G. Johannesen / Mynd: Álvur Haraldsen